*(Í greinini, sum var í blaðnum herfyri, vóru tíverri nakrir skeivir upplýsingar komnir við, so vit endurprenta greinina her við rættingum)*

# **Daddan** hevur alt til børn og ung

**Daddan er elsti barnahandil í Føroyum, og drúgvu royndirnar og áhaldandi stríð fyri at hava dygdina í hásæti, kemur kundunum til góðar.**

**HANDIL**

Elsti barnahandil í Føroyum eitur Daddan, og handilin hevur meira enn 20 ár á baki. Núverandi eigarin hevur havt handilin síðani 2006, men handilin hevur ligið uppi á Hálsi í eini 12-13 ár.

### Brúðarklæði

Sum helst einasti handil í Havn hevur Daddan brúðarklæðir til tey smáu. Tað vil eisini siga, at her fáast t.d. klædningar til smádreingir, og annars alt til tey smáu, tá tey skulu pyntast.

Daddan selur klæðir til børn og ung millum 0 og 16 ár.

Klæðini til børn millum 0-8 ár eru frá Møller & Co, ið er gott og gamalt danskt firma, sum hevur eini 100 ár á baki. Merkini frá Møller & Co. eita Tiny Minymo og Minymo. Hetta eru góð klæði, og leggur Daddan eisini allan vegin dent á, at góðskan er í hásæti.

### Móti

Daddan hevur, umfram klæðir, ymiskt annað at bjóða, t.d. taskur, turrikløð, hárprýði og aðrar smálutir.

Barnamótin er, eins og hjá teimum vaksnu, skiftandi. Mótin skiftir fleiri ferðir árliga, og longu tá talan er um klæði til hálvt ára gomul børn, kemur mótin inn í myndina.

Og sjálvandi er mótin av týdningi, tá talan er um klæðini til tannáringarnar, og har skiftir mótin ofta og merkini Nextlevel og Grunt fylgja væl við.

### Litir

Litirnir í summar eru fyri tey eldru børnini: ljósablátt, gult og annars ljósir litir. Hjá dreingjunum eru tað litirnir gult og svart, sum eru frammi og rigga hesir sera væl saman.

Hjá smærru børnunum eru tað dempaðir litir, ið eru frammi í summar, meðan t.d. turrikløðini eru í sterkum litum.

### Kend merkir

Daddan umboðar Spiderman og Smølfine, har gummistivlar, løriftskógvar og inniskógvar eru at fáa.

Eisini umboðar Daddan góða gamla merkið Viking, ið hevur gummistivlar.

Daddan hevur stutt sagt alt til børn millum 0 og 16 ár.

### Kring alt landið

Talan er um handil, ið umboðar eitt breitt úrval og nýggj merkir eru komin til. Eisini er plássið gott í teimum 350 fermetra stóru hølunum.

Daddan sendir kring alt landið.

Til ber at vitja www.daddan.net

**Tilboð hendan mánaðin**

**Daddan hevur sera gott tilboð hendan mánaðan. Øll vøra frá Grunt og Tiny Minymo - 20%.**



a h j e n s e n . c o m

DAMPREINSARI VIÐ SÚGVING

Mirage 3000 er ein kombineraður dustsúgvari og dampreinsimaskina. Sera hent hjá matstovum, handlum og stovnum.




A.H. Jensen

- útgerð til vaskifólkið

STOFFALÁG 44 · TLF 322676

Fjølbroytni



Vit gera stórt og smátt

BSV

Har vitan og handverk sameinast

P/F Bygningssnikkaravirkið
Smyrilsvegur 4 · Postsmoga 1087
FO-110 Tórshavn · Tel: 31 25 87
bsv@bsv.fo · www.bsv.fo



Spunagøta
160 Argir
tel 32 10 30
eikin.fo

Eikin

- eitt sindur hugnaligari



Smartir summar jakkar til prinsessurnar frá REBUS

Í Miðlon · Hoyvíksvegur 67
100 Tórshavn · Tel 321755

SNÁK